DAGSINS MEINING

Upplýsing fortreyt

Í gjár viðgjørdu vit í hesum teigi ráðstevnuna um psykiatriskar truplleikar hjá børnum og ungum. Vit vístu á, hvussu týðandi evnið var, og vit nevndu, at her í stóran mun var talan um eitt tabu-evni. Her er talan um eitt øki, sum vit vita alt ov lítið um. Nógvir fordómar, happing og annað óheppi í samband við sálarfrøðiligar trupulleikar koma ofta av manglandi vitan um og av ókunnleika til andlig ella sálarlig brek, teirra orsakir og teirra eyðkenni. Tað man vera alkunnugt, at tørvur er á at bøta um hesi viðurskifti, og at vit øll hava brúk fyri at vita meira um evnið fyri ráðstevnuni í Norðurlandahúsinum seinasta mánadag.

Í hesum sambandi er besta amboði til tess at koma fordómum og tørvandi vitan sum kunnugt upplýsing og kunning. Góð, saklig og fjøltáttað upplýsing er forteytin fyri at bøta um støðuna hjá børnum og ungfólki við sálarligum trupulleikum. Hetta er eisini fortreytin fyri at bøta um støðuna hjá øllum við slíkum trupulleikum. Aðrar fortreytir eru sjálvsagt eisini at hava í huga, sum vit vístu á í oddagrein í gjár. Hugskotið við at nýta ein psykiatribuss til hetta endamál er frálík. Hetta er ein øðrvísið og meira spennandi máti at reka upplýsing og fremja kunning um eitt torført og torskilt evni.

Við psykiatribussinum røkka fyrireikararnir út til umleið 70% av næmingunum í fólkaskúlanum og í miðnámsskúlunum. Hetta, at eitt so stórt tal av børnum og ungfólki verður kunnað um sálarfrøðiligar trupulleikar, kann ikki yvirmetast. Hesi ungu er jú tann mest týðandi málbólkurinum, tí hesi eru tey, sum um stutta tíð fara at mynda framtíð Føroya. Tað er tí einki minni enn eitt bragd at rokkið verður hesum stóra og týðandi málbólki, og tað fer ivaleyst at bera góðan ávøkst seinni.

Ráðstevna og psykiatribussur eru frálík og sera týdningarmikil tiltøk, sum ivaleyst fara at slóða fyri øktari fatan og ivaleyst eisini fyri bøttum umstøðum og viðurskiftum hjá teimum mongu, ið hava psykiskar trupulleikar at dragast við. Vit ynskja tiltakinum góðan byrð og vóna samstundis, at avvarandi politikkarar kenna sína ábyrgd og fylgja hesum tiltøkum upp við neyðturviligum játtanum og hóskandi politiskum tiltøkum.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Alternativir vinnumøguleikar

21. øldin bjóðar vinnum, stjórnum og samfeløgum til frælsa kapping. Vit eru, um vit vilja tað ella ikki, tvungin at verða við í hesi kapp-ing, um vit vilja skapa stabilan vøkstur og vælferð, eisini í teim tíðum, tá hjallurin á havinum er kargur.

Eg kundi nevnt eina rúgvu av ymiskum alternativum vinnumøguleikum, men teir reka bert burt í vindinum, um ikki grundarsteinurin og karmarnir fyri hesum hugskotum eru til staðar. Eg vil tí heldur hugleiða um hvørjar fyritreytir, ella hvat umhvørvið skal verða til staðar, fyri at geva alternativum vinnumøguleikum ella verkætlanum tað lagnu, sum tær av røttum skulu hava, nemliga »Succes«.

Eitt eykenni fyri tær fyritøkur ella tey lond, ið trívast í einum tílíkum umhvørvi, er nýhugsan ella nýskapan.

Nýskapan er meira enn verkætlanir ella uppfinning av nýggjum vørum.

Nýskapan kann eins væl vera tengt at øðrum tilgongdum sum t.d. sambandinum, vit hava við veitarar, distributión, leiðslu og sjálvum konceptinum hjá fyritøkuni.

Tað setir krav at vera nýskapandi, serliga tí at nýskapanin hevur váða við sær; avkastið fyri framman er óvist, og tíðum ómøguligt at gera upp.

Okkara samfelag tryggjar tann einstaka borgarin so væl frá vøggu til grøv, at tað gerðast alsamt færri og færri sum velja tann ótrygga, men spennandi vegin, at gerðast sum amerikanarnir siga »self made man«.

Stuðul er ikki bert oyðileggjandi, eftirsum tað eru tvey sløg av stuðli.

Tey sum eg vil kallað »igongdsetarar« leita ikki við lygt eftir, hvar tey kunnu fáa mest møguligan stuðul. Tey stóla 100% uppá egnu dygdir og satsa alt uppá at teirra hugskot skal eydnast. Hesi hava ein aðra muru enn tey, sum vit fyrr til tíðir í Føroyum kallaðu »teir sokallaðu vinnulívsmenninir« hvørs størsta hugflog var at mjólka landskassanum.

Rakstrarstuðul er kappingaravlagandi og niðurbrótandi, eingin ivi er um tað.

Tilgongdin hjá einari fyritøku sum satsar uppá nýskapan er ofta long - nógv arbeiði verður gjørt til fánýtis, og nógvir trupulleikar skula loysast, áðrenn nakar vinningur er í eygsjón.

Bygnaðurin í eini innovativari fyritøku má verða fleksibul. Fyritøkan má hava eitt ávíst kunnleikastøði innanhýsis, men samstundis vera opin og fáa atgongd til netverk uttanfyri, soleiðis at fyritøkan ikki avmarkar seg sjálva.

Stagnatión er størsta forðingin fyri nýskapan, tí nýskapan krevur viljan at læra.

Sjálv innovatiónin kann býtast upp í trý stig:

• Uppfinningin, ella tað at fáa eitt hugskot (hugskot, skriva verkætlan) hugskot (búmerki liðugt)

• Menningin, frá hugsan til veruleika (igongdsetan) at fáa kapacitetin í lagi, Íløgufígging og rakstrarfígging, neyðugar iløgir, samskipan, og nú er klárt at seta í gongd. (fysiskar rammir)

• Handilsskapurin, at fáa hugskotið at geva avkast. (samskifti við umheimin)

Tríðja stigið í innovatiónstilgongdini, nevniliga at fáa innovatiónina at geva avkast, fevnir um flutning, sølu, marknaðarføring v.m. Her krevst samskipan.

Hvørt av hesum trimum stigunum í innovatiónstilgongdini setir umhvørvinum heilt ymisk førleikakrøv.

Fyrsta stigið í tilgongdini er at fáa hugskot.

Størsti bágin í »Føroyum« er ikki, at fólki trýtur hugskot, men heldur, at umhvørvið ikki eggjar til henda hugburð, tí innovatión krevur vilja til at vága, og at tora, sjálvt hugskotið er neyðugt um ætlanin skal førast út í lívið, men hugskotið er bert ein ógvuliga lítil partur av, um øll verkætlanin gerst veruleiki.

Lat okkum taka nýggju Norrønu sum dømi, ein iløga uppá 700 mill, men vit minnast at fólk og ileggjarir vóru skeptisk, og fleiri hildu og halda tað verða púra ørt við hesum skipi, og tað av góðum grundum. Vit høvdu einki fordømi uppá eitt luksus skip við hesum kostnaði í Føroyum. Grundin til at verkætlanin gjørdist veruleiki var í grundini, at útlendskur kapitalur slóðaði vegin uppá íløguna,

Manglandi umhvørvi skapar ótryggleika og skepsis. Taka vit tildømis Noreg, so hevði ein sovorðin verkætlan sum Norrøna verði í heimligum umhvørvi frá byrjan, tí bankar og ileggjarir fíggja og eiga hópin av luksus ferðamannaskipum frammanundan, ikki tí tey sigla í Noregi, men tí norðmenn hava vitanina og hava skapt sær sjálvum karmarnar til hesi ferðamannaskip.

At nýta orku til at fara víðari í innovatiónstilgongdini, har framtíðar avkastið ikki er eyðsæð, krevur harafturat stórt álit millum alment og privat. Tað álitið er sera ringt at fáa eyga á í hesum tíðum, eisini tí at í okkara samfelag er alment vinnulív tann størsti kappingarneytin hjá tí privata, sum tað er sagt so oftani: Kreppuloysnirnar í krepputíðum eru vorðnar varðandi loysnir í bestu tíðum, uttan serdømi nakrastaðni í okkara parti av heiminum.

Um evnarík fólk ella ígongdsetarar síggja, at umhvørvið onga veruliga tilturúgv hevur til teirra hugskot, doyr innovatiónsandin.

Hinvegin skal tað professionella umhvørvið lúka út í hugskotunum og duga so væl at útgreina avgerðirnar, at innovatiónin yvirlivir.

Umframt álit og kunnleika krevur næsta menningarstigið frá hugskoti til veruleika áhaldni og disciplin.

Samstundis kann júst hetta stigið bera í sær hugskotini til nýggjar innovatiónstilgongdir.

Afturmeldingar frá marknaðinum eru góðar keldur til at finna ábøtur og nýggj hugskot - um viljin at læra er til staðar. Lat okkum nú siga at eg fái eitt hugskot, sum er alternativt, og eg búgvi í Norður Skotlandi, hvørjir eru mínir møguleikar sum kappingarneyti hjá einum Føroyingi sum fær sama hugskot.

ES grunnur stuðlar 35% fyri bygging og maskinir + 5% lokalan stuðul. Hetta er í landnyrðingspartinum av Skotlandi. Í Inverness økinum kanst tú fáa frá hesum 40% upp til 70% frá »Local highland Council/parlament«. Harumframt er stuðul at hjálpa ella leggja lag á hjá arbeiðsfólki tað fyrsta árið. Um tað eru vinnur, sum ongantíð áður eru royndar, so verður stuðul so at siga altíð veittur. Hetta verður gjørt, fyri at onnur øki ella onnur lond ikki skulu fara avstað við verkætlanini.

Íleggingarstuðul er góð-ur, um hann er tíðaravmarkaður bert til ígongdsetarar, men tá eiga øll innan somu branchu at hava somu treytir.

Øll innovatiónstilgongin krevur soleiðis yvirlit, tí avbjóðingin er at byggja brúgv frá hugskoti til marknaðin.

Hugburðurin er at samansjóða áhugamálini hjá kundanum, starvsfólkunum og leiðsluni.

Innovatión ella nýskapan er ikki ein tilstandur, ið ein fyritøka knappiliga kemur í. Innovatiónshugburðurin skal verða innbygdur í allari fyritøkuni - 365 dagar um árið.

Fyri at taka samanum, so eru minimumskrøvini, ið tann politiski mynduleikin skal skapa:

• Politiskur stabilitetur

• Avtaka alla kapping millum alment og privat virksemi

• Fara frá orðinum at verða liberalur til at útinna liberalismuna í verki.

• Geva ígongdsetarum minst somu treytir sum ES gevur sínum ígongdsetarum

• Málbær kriterir fyri verkætlanum (vinar og kenningarpolitikkur skal burtur)

Kaj Leo Johannesen
Sambandsflokkurin

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
Sosialurin í Vágum:
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Fiskavirking umhugsar at stevna Miðvágs kommunu

– Tað, sum hendi við vatninum í Miðvági, er undir alt lágmark, bæði mótvegis okkum sum framleiðara og borgarunum í kommununi, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking, sum nú umhugsar at stevna kommununi eftir endurgjaldi

DÁLKAÐ VATN
Vilmund Jacobsen

– Kunnu vit ikki hava álit á kommununi, er torført at framleiða í økinum, sigur Meinhard Jacobsen, stjóri í Føroya Fiskavirking

Stjóranum á Føroya Fiskavirking, Meinhardi Jacobsen, vantar ikki orð, tá ið vit spyrja hann, hvat hendi við vatninum, sum virkið í Miðvági brúkar í síni framleiðslu av matvørum.

– Eg haldi, at hetta er undir alt lágmark. Visti eg ikki, hvussu vorðið var, hevði eg ikki trúð, tað var satt.

Meinhard sigur, at tænastan, sum Miðvágs kommuna í hesum førum hevur veitt virkinum og sínum borgarum, er so vánalig, at orð kunnu ikki setast á tað.

E-coli bakteria

Fyri 14 døgum síðan læt virkið hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági aftur, tí bakterian, e-coli, varð staðfest á virkinum.

– Tað var okkara egna eftirlit, sum fann út av, at bakterian var í vatninum. Tá ið vit fóru at kanna eftir, hvussu hetta hekk saman, kom fram, at kommunan – uttan formelt at hava boðað okkum frá – hevði veitt áarvatn í vatnføringina. Slíkt er fullkomiliga óforsvarligt at gera seint um summarið, tá ið tað aftur fer at regna, eftir at bøurin hevur ligið turrur leingi.

Spurdur, nær hann heldur, at kommunan hevur veitt áarvatn í vatnføringina, sigur Meinhard, at kommunan treyðugt hevur upplýst um hesi viðurskifti, hóast teir eiga at gera tað.

– Men eg trúgvi, at hetta er gjørt fyri ólavsøku, sigur hann.

Meinhard leggur dent á, at sjálvsagt skal eingin bakteria finnast í matvørunum, sum virkið framleiðir.

– Í hesum førinum er talan um e-coli bakteriuna, sum stavar frá skarni úr fugli, seyði ella mennisjkjum.

Spurdur neyvari um bakteriuna, skavar Meinhard ikki útyvir tað, sum hent er:

– Klórar tú tær í reyvini, kanst tú rokna við, at tú ber e-coli bakteriuna á fingrunum!

Ábyrgdarleyst

Hann heldur, at upplandið, har kommunan hevur veitt vatn úr áunum, er soleiðis háttað, at tað er serliga viðbrekið fyri hesi bakteriu, sum skolar eftir vøllinum við regnvatninum – og endar í vatngoymslunum hjá Miðvágs kommunu.

– Tað er fullkomiliga ábyrgdarleyst av kommununi at gera slíkar umleggingar av vatninum uttan formelt at boða virkinum og borgarunum frá hesum. Hetta hoyrir ongastaðni heima.

Meinhard sigur, at umboð fyri Føroya Fiskavirking var á fundi við Miðvágs kommunu, 27. juni í ár, tá ið onkur ætlaði sær at sproyta mykju á bøin, nær vatninum.

– Slíkt ber ikki til, og hetta bleiv so heldur ikki gjørt.

Vit spurdu eisini Meinhard, um hann hevur hoyrt nakað um, at vatnið, sum førdi til, at virkið mátti lata aftur, hevur verið til bága hjá fólki.

– Eg eri ikki tann rætti at spyrja um hetta, men tað er komið mær fyri oyra, at onkur í bygdini hevur havt leyst lív, sum plagar at vera fyrsta tekini, tá ið vatnið verður dálkað.

Hvat nú?

Meinhard sigur, at kommunan nú hevur boðað frá, at alt er í lagi við vatninum aftur, men hann ivast í, hvussu stórt álit, teir kunnu hava á kommununi, tá ið hon ikki kunnar virksleiðsluna um slík viðurskifti, sum eru av so ómetaliga stórum týdningi.

– Kunnu vit ikki hava álit á kommununi, er torført at framleiða í økinum, sigur hann.

Føroya Fiskavirking fer nú at hyggja eftir, hvussu vorðið er og fer at tryggja sær, at alt er í lagi, áðrenn nakað meira verður gjørt. Øll vatnskipanini á virkinum má reinsast bæði væl og virðiliga.

– Tað er greitt, at hetta er eitt tap fyri okkum. Nógv vøra er á goymslu, bæði gulllaksur og onnur vøra, og her verður neyðugt at kanna eftir, um alt er, sum tað skal vera.

Meinhard Jacobsen sigur at enda, at Føroya Fiskavirking eisini fer at taka støðu til, um felagið skal saksøkja Miðvágs kommunu eftir endurgjaldi í hesum máli.

Vatnið í Miðvági er nú reint aftur

Miðvágs kommuna sigur, at brunnarnir og øll vatnskipanin er klorviðgjørd og reinsað eftir forskriftum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

REINSAÐ VATN
Vilmund Jacobsen

Tað var ein leki í pumpuskipanini hjá Miðvágs kommunu, sum gjørdi tað neyðugt at føra áarvatn í vatnleiðingina.

Miðvágs kommuna sigur, at tey altíð pumpa vatn úr Leitisvatni um summarið, frá einaferð fyrst í juni, til fyrsta frostið hevur verið. Tá ið so frostið hevur verið, er vatnið í árunum líka reint, sum vatnið úr Leitisvatni.

– Tað, sum hendi í summar, var, at leki kom á pumpuleiðingina úr Leitisvatni. Hendan er løgd, áðrenn nýggi vegurin millum Miðvág og vatnið er gjørdur. Torført var at finna lekan, tí strekkið, har hann kundi vera, er so langt. Vit gróvu niður ymsastaðni, men funnu hann ikki í fyrstu syfti. Tí vórðu vit noyddir at taka vatn úr áunum, og tað fekk Føroya Fiskavirking boð um í brævi. At enda funnu vit so lekan næstan tveir metrar undir vegnum.

Miðvágs kommuna avgjørdi at leggja eina nýggja leiðing, sum er umleið ein hálvan kilometur long.

– Hetta arbeiði varð liðugt eftir góðari viku síðan, og nú verður aftur pumpað úr Leitisvatni.

Miðvágs kommuna sigur, at brunnarnir og øll vatnskipanin er klorviðgjørd og reinsað eftir forskriftum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni

– Síðsta hósdag, áðrenn skipanin varð klorviðgjørd, tóku vit vatnroyndir sum vístu, at næstan ongar e-coli bakteriur longur eru í vatninum. Nú skipanin er klorviðgjørd, hava vit aftur tikið royndir, og vit vóna, at øll bakterian nú er burtur úr skipanini.

Miðvágs kommuna sigur, at vatnið í Miðvági nú er so reint sum neyvan nakra aðrastaðni í Føroyum.

– Vit hava havt eitt av teimum mest framkomnu reinsiverkunum í mong ár. Vatnið verður fyrst filtrerað gjøgnum sandfiltur og síðan UV-strálað. Verður síðan mett, at neyðugt er at klorviðgera vatnið, verður tað eisini gjørt. Tað tekur tann støðu til, sum hevur vatnið í kommununi um hendi, sigur Miðvágs kommuna.